

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 10 - 2011

# Norsk oljuframleiðsla minkar hóast fund

Norska oljuframleiðslan fer framhaldandi at minka hóast eitt risastórt oljufund varð gjørt herfyri, eitt fund, sum møguliga er tað triðstørsta í allari norsku oljusøguni. Hetta upplýsir stjórin í norska oljudirektoratinum skrivar Reuter úr Stavanger. Stóra fundið, Avaldsnes/Aldous Major, er tað størsta oljufundið, sum er gjørt í heiminum í ár og rúmar millum 1,2 og 2.6 milliardir tunnur av olju. Framleiðslan fer at halda fram við at minka, og hetta fundið fer bara at gera, at tað fer at taka longri tíð, sigur Bente Nyland, stjóri í direktoratinum, sum umsitur alt tilfeingi av olju og gassi í Noregi. Norska oljuframleiðslan var hægst í 2001 og er síðani minkað. Henda minking verður mett at taka veruligt dik á seg eftir 2020. Hetta nýggjasta fundið hevur kortini beint burtur nakað av óvissuni um framtíðar framleiðslustøðið í Norra. Landið er í dag á einum áttanda plássi, tá ræður um oljuútflutning í heimshøpi, og nr 2, tá talan er um gass. Kortini er tørvur á nógv meiri olju og gassi skal oljuframleiðslan vaksa, sigur Bente Nyland.